# SAMAN FRAMÁ

STRATEGI 2026 - 2030


errea
10
errea

# INNIHALD


| | |
|---|---|
| FORORÐ | 7 |
| GRUNDARLAGIÐ | 9 |
| HESUM HAVA VIT ROKKIÐ | 15 |
| SAMAN FRAMÁ | 17 |
| BETRI ÚRVALSAVRIK | 21 |
| LUTTØKA Í HEIMSFLOKKI | 25 |
| KVINNUR Í FÓTBÓLTI | 29 |
| STERKUR OG SAMEINDUR FELAGSSKAPUR | 33 |
| VIT SIGA OKKARA SØGU | 37 |
| STUÐLANDI VERKÆTLANIR | 41 |



**SAMAN FRAMÁ**
STRATEGI 2026 - 2030

**Fótbóltssamband Føroya**
Februar 2026
Tekstur og myndir: FSF
Prent: Føroyaprent






# FORORÐ

**Føroyskur fótbóltur stendur á sterkari grund við vaksandi luttøku, betri umstøðum, virknum feløgum, stórum áhuga og góðum avrikum. Nú skulu vit byggja á hesa grund, so vit saman kunnu halda fram við menningini og lyfta føroyskan fótbólt upp á enn hægri stig – bæði á heimavølli her í Føroyum og á útivølli í altjóða kappingum.**

Tað er mær ein stór gleði at leggja fram nýggja strategi hjá Fótbóltssambandi Føroya fyri árini 2026-2030. Kjarnin í strategiini er einfaldur og greiður: Saman framá! Hetta er meira enn eitt slagorð. Hetta er arbeiðsháttur okkara og staðfesting av, at føroyskur fótbóltur verður best mentur, tá ið vit arbeiða saman – feløg, spælarar, venjarar, dómarar, sjálvboðin, stuðlar og FSF. Tað er í hesum felagsskapi, at styrkin liggur, og at framtíðin verður skapt.

Vit byggja á tað góða grundarlagið, sum longu er lagt. Vit vilja framhaldandi tryggja stóra og breiða luttøku, vit vilja hjúkla um góð, trygg og fevnandi fótbóltsumhvørvi fyri øll, samstundis sum vit arbeiða miðvíst við at menna úrvalið og styrkja okkara altjóða kappingarføri. Vit vilja menna kvinnufótbóltin enn meira, styrkja feløgini sum pumpandi hjartað í føroyskum fótbólti og siga okkara søgu greiðari bæði heima og úti. Samstundis fara vit at seta í verk átøk, sum kunnu skapa varandi karmar fyri menning – betri og javnari kappingar og betri venjingarumstøður, eisini við fótbóltshallum.

Ein hornasteinur í føroyskum fótbólti er sjálv-boðið arbeiði og lokalur eldhugi kring landið. Uttan hann hevði føroyskur fótbóltur ikki verið tað, hann er í dag. Tí er tað eisini ein týðandi partur av strategiini at stuðla feløgunum, styrkja samstarvið millum FSF og feløgini og tryggja, at sjálvbodna mentan okkara eisini í framtíðini kann bera føroyskan fótbólt fram á burðardyggan hátt.

Strategiin er ikki bert eitt skjal. Hon er ein felags arbeiðsætlan og ein innbjóðing til alla fótbóltsfamiljuna um at taka lut í menningini. Málini eru stór, men møguleikarnir eru til staðar. Við at brúka okkara styrkir – framfýsni, arbeiðssemi og samstarv – kann føroyskur fótbóltur taka nýggj og týdningarmikil stig komandi árini.

Dreymurin um at koma í endaspæl tykist meira veruligur eftir framúr avrik í farnu undankappingum. Vit vita, at kappingin um plássini í endaspølum er sera hørð, men vit hava nú víst, at vit kunnu bjóða av, og stóra málið verður at koma í eitt endaspæl í hesum strategitíðarskeiði.

Latið okkum halda fram við at menna føroyskan fótbólt – við stórum málum, sterkum felagsskapi og greiðari trúgv upp á, at saman røkka vit langt og megna vit mangt.

Nú seta vit kós saman fram í tíðina.



**SAMAN FRAMÁ!**

**Christian F. Andreasen**
*forseti í FSF*





# GRUNDARLAGIÐ

**Við at vita, hvørji vit eru, hvaðani vit koma, hvørjum vit standa fyri, og hvagar vit fara, kunnu vit flyta okkum saman fram ímóti málum okkara.**

Grundarlagið undir nýggjari FSF-strategi skal virka sum stevnumið hjá FSF og føroyskum fótbólti og vera við til at styrkja samstarv og framburð.

**Grundreglan hjá FSF er "Saman framá"**

***Vit eru ágrýtin – virka fullhugað á øllum stigum frá barnafótbólti til landslið***

***Vit arbeiða miðvíst – seta høg krøv og arbeiða hvønn dag fyri at gerast betri***

***Vit hava integritet – eru heiðurlig, rímilig og virðilig í arbeiði og umboðan***

***Vit tæna felagsskapinum – stuðla feløgunum, tæna fólkinum og seta føroyskan fótbólt fremst***





# VISJÓN

***At kveikja eina sterka fótbóltstjóð – har samanhald er grundvøllurin, dygd er eyðkennið og málini ikki hava mørk***





# MISSJÓN

***Vit styrkja, menna og tæna føroyskum fótbólti – vísa leiðina og savna fólkið***





# HESUM HAVA VIT ROKKIÐ

**FSF er fegið um tað, sum føroyskur fótbóltur hevur rokkið í undanfarna strategitíðarskeiði. Við miðvísum arbeiði og góðum samstarvi í føroyska fótbóltsheiminum hava vit tikið týðandi stig fram ímóti málum okkara og skapt gott grundarlag fyri framtíðar menning.**



Áhugin vaks og luttøkan øktist í øllum aldursbólkum. Frá 2021 til 2025 vaks luttøkan í fótbólti 20 %. Betri umstøður, sterkari feløg og meira rúmlig og fevnandi fótbóltsumhvørvi hava hjálpt til at fáa alt fleiri at spæla fótbólt kring landið.

Grundarlagið undir kvinnufótbólti er styrkt munandi við strategiskum átøkum, sum hava lagt dent á økta luttøku, ítróttarliga menning og bygnaðarligar broytingar, sum tryggja haldføra menning og umboðan í longra lagi.

Venjaraútbúgvingin heldur fram at mennast við nýggju UEFA C-útbúgvingini og nýggjum føroyskum skeiðstilfari. Hetta tryggjar hægri venjarastøði og eina nútímans og skipaða menningarleið fyri føroyskan fótbólt.

Føroyskur fótbóltur er vorðin sjónligari við víðkaðum sendiavtalum, sum veita betri atgongd til dystir og styrkja áhugan fyri bæði kvinnu- og mansfótbólti kring landið.

Hesi avrik hava havt góða ávirkan á føroyskan fótbólt, sum er mentur á fleiri økjum. Seinastu árini hava vit megnað at styrkt spælið við fleiri spælarum, fleiri liðum og størri møguleikum.

Nú fara vit inn í næsta menningarstigið og hugsa eins nógv um dygd og um mongd. Vit vilja varðveita tað, sum vit hava bygt upp, samstundis sum vit økja um krøvini og ambitiónirnar, so føroyskur fótbóltur kann mennast á øllum stigum.





# SAMAN FRAMÁ

**Góða gongdin í føroyskum fótbólti er sprottin úr føroyskum jørðildi. Okkara tjóð er serstøk og sterk. Vit kenna øll hvønn annan, vit arbeiða saman, og vit hava brennandi áhuga fyri fótbóltsspælinum. Nú seta vit nýggj mál við vónríkum vilja. Saman við styrktum feløgum kunnu vit menna góðar spælarar, og tá ið vit hækka støðið, styrkja vit framsøknið.**

Næstu árini fara vit at leggja dent á at styrkja feløgini sum framhaldandi grundarlag undir føroyskum fótbólti. Vit fara at stuðla teimum í menningini, stimbra góðskuna við útbúgving og samstarvi og skapa miðvísar menningarleiðir, sum binda saman breiddar- og úrvalsfótbólt. Samstundis seta vit okkum hægri mál. Vit halda fast um tað, sum vit eru og standa fyri, og vit fara eftir framgongd í altjóða fótbólti.

Fyri at røkka hesum mugu allir partar av føroyskum fótbólti endurspegla okkara ambitiónir. Venjingarumstøður. Venjingin. Kappingarnar. Og stuðulin til feløgini. Alt má liva upp til tað støðið, vit vilja røkka. Vit hava bygt eitt sterkt grundarlag – nú skulu vit hækka góðskuna á tí, sum vit byggja á grundarlagið.

Vit ásanna, at FSF ikki kann røkka hesum einsamalt. Feløg, venjarar, spælarar, sjálvboðin og lokalsamfeløg hava øll ein týðandi leiklut. Saman fara vit at skapa eina sterkari framtíð fyri føroyskan fótbólt.

***Sterkari feløg. Størri ambitiónir. Saman framá!***



## Saman um menningina

Hendan strategi er ment í tøttum samstarvi við tey, sum kenna føroyskan fótbólt væl. Við verkstovum við feløgum, kjaki við áhugapartar, kanningum og greiningum eru røddir úr ymsum pørtum av spælinum slopnar upp í part – harvið endurspeglar hendan ætlan veruleikan og ambitiónirnar í føroyska fótbóltsumhvørvinum.

# SAMAN FRAMÁ

STRATEGI **2026 - 2030**

VISJÓN

***At kveikja eina sterka fótbóltstjóð – har samanhald er grundvøllurin, dygd er eyðkennið og málini ikki hava mørk***

STRATEGI

### BETRI ÚRVALS-AVRIK

Menna úrvals-umhvørvi fyri framtíðar fótbólts-spælarar.

### STERKUR OG SAMEINDUR FELAGS-SKAPUR

FSF, feløgini og áhugapartar skulu mennast saman.

### VIT SIGA OKKARA SØGU

Sterk søgufrá-søgn og miðvís marknaðarføring kveikir framtíðina hjá føroyskum fótbólti.

### LUTTØKA Í HEIMS-FLOKKI

Fótbóltur fyri øll. Alt árið. Alt lívið.

### KVINNUR Í FÓTBÓLTI

Fótbóltur skal vera best umtókta ítróttargrein ímillum kvinnur.




# BETRI ÚRVALSAVRIK

## *Menna úrvalsumhvørvi fyri framtíðar fótbóltsspælarar.*

Skulu vit áhaldandi standa okkum væl í altjóða fótbólti, krevst bæði ein góð skipan og áræði. Vit vilja menna samanknýtt úrvalsumhvørvi frá U13 til A-landsliðini – ein samanhangandi leikhátt, dygdargóða úrvalsvenjing fyri teir bestu ungu spælararnar og gott samstarv ímillum feløg og landslið.



**Soleiðis sær framgongdin út í 2030:**

***Samanhangandi leikháttur fyri øll landslið er settur í verk***

***Venjingarumhvørvi á úrvalsstigi er tøkt til bestu ungdómsspælararnar***

***Gongdin frá breidd til úrval er smidlig og týðilig***





## BETRI ÚRVALSAVRIK

### FOKUSØKI 1 Úrvalsarbeiði í landsliðshøpi

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Menna ein samanhangandi leikhátt, ið eisini fevnir um samleika og venjingarhátt, fyri landsliðini frá U15 til A-landsliðini. | Samanhangandi leikháttur settur í verk á landsliðunum í øllum aldursbólkum. |
| Menna og víðka úrvalsvenjingina fyri bestu ungdómsleikararnar í landinum (U14-U17). | 30 spælarar úr hvørjum aldursbólki luttaka í úrvalsvenjingini. |
| Seta í verk økisvenjingar fyri U13-leikarar, sum fyrireiking til miðsavnaðu úrvalsleiðina. | 40 % av U13-leikarum luttaka í økisvenjingunum. |

### FOKUSØKI 2 Samanspæl við feløgini

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Skapa felags fótbóltssamleika við at eggja til ungdómarbeiði í feløgunum, sum er í samsvari við FSF leikhátt. | 50 % av feløgunum brúka FSF leikháttin sum íblástur til at skipa sítt ungdómsarbeiði. |
| Skapa ein skipaðan samstarvshátt millum FSF og feløgini um leikaramenning. | Tvey samstarvstiltøk fyri venjarar um árið. |

### FOKUSØKI 3 Venjaramenning

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Fyrireika okkara venjarar til framtíðina við at menna A-venjaraútbúgvingina við denti á leiðslu, dátu og vitlíki. | 30 venjarar taka A-venjaraprógv hetta strategitíðarskeiðið. |
| Skipa eitt netverk fyri okkara úrvalsvenjarar og tryggja framhaldandi menning til altjóða fótbólt í framtíðini. | Eitt árligt tiltak við netverkan og framhaldandi útbúgving fyri 20 útvaldar venjarar. |
| Skapa eina venjaraleið fyri kvinnur fyri at økja um talið á kvinnum við A-venjaraprógvi. Leiðin skal fevna um vegleiðarar til kvinnuligar venjarar. | Tríggjar kvinnur taka A-venjaraprógv og arbeiða framhaldandi sum venjarar hetta strategitíðarskeiðið. |





# LUTTØKA Í HEIMSFLOKKI

## *Fótbóltur fyri øll. Alt árið. Alt lívið.*

Føroyskur fótbóltur er heimsmeistari í luttøku, og tað vilja vit framhaldandi vera. Í komandi strategitíðarskeiði leggja vit serligan dent á dygd og burðardygd. Vit vilja skapa trygg, rúmlig og jalig umhvørvi, sum styðja upp undir lívslanga luttøku og trivnað hjá øllum bæði á vøllinum og uttan fyri vøllin. Vit fara at bjóða breiddartilboð við høgari góðsku, lagað til ymisku tørvirnar hjá børnum, ungum, vaksnum og teimum, sum vilja vera virkin alt lívið.



**Soleiðis sær framgongdin út í 2030:**

***Føroyar eru framhaldandi heimsmeistarar í luttøku í fótbólti***

***Fótbóltur alt árið er vanligur heldur enn undantak***

***Øll kenna seg væl at vera við í fótbólt – uttan mun til aldur, førleikar ella ambitiónir***





## LUTTØKA Í HEIMSFLOKKI

### FOKUSØKI 1 Luttøka og varðveitsla

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Fara undir eina landsfevnandi granskingarverkætlan innan barnafótbólt fyri at skilja luttøkumynstur, orsøkir til fráfall, og hvat motiverar leikarar uttan mun til aldur, kyn og førleika. | Menna og seta í verk ætlan fyri at fasthalda leikarar og breiða vitan út til øll feløg. |
| Víðka um tilboðið av spælimøgu-leikum, so fleiri kunnu halda longur á við at spæla fótbólt – uttan mun til aldur, kyn, førleikar ella ambitiónir. | Minka um fráfall og tryggja, at 20 % av leikarum flyta seg yvir á breiddar-tilboð heldur enn at gevast. |

### FOKUSØKI 2 Fótbóltur fyri øll

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Skapa gróðrarbotn fyri fótbólts-tilboðum í samstarvi við skúlar, frítíðarskúlar og dagstovnar. | 70 % av skúlum, frítíðarskúlum og dagstovnum luttaka í skipaðum fótbóltsvirksemi. |
| Halda børn og ung til fótbóltin í summarferiu og í vetrarhálvu. | 300 børn luttaka árliga í skipaðum tiltøkum uttandura í summarferiuni og innandura um veturin. |
| Stuðla feløgunum við at skapa tryggar og innbjóðandi kringumstøður, har børn og ung trívast og rúm er fyri øllum. | Útgeva tilfar, ið lýsir, hvat er best fyri børnini og tey ungu. Herundir Kappingarfilosofi fyri børn, Tað góða dystarumhvørvi, og Ætlan fyri góða barnavenjing. |

### FOKUSØKI 3 Venjaramenning

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Útbúgva venjarar, so hesir hava neyðugar førleikar til at taka ímóti leikarunum og skipa góðar og aldurshóskandi venjingar. | Dagføra innihaldið í námsætlan fyri UEFA C-venjaraútbúgvingina og bjóða styttri modul-skeið, ið viðgera viðkomandi evni. 30 venjarar fullføra hesi á hvørjum ári. |






# KVINNUR Í FÓTBÓLTI

## *Fótbóltur skal vera best umtókta ítróttargrein ímillum kvinnur.*

Kvinnufótbóltur hevur framgongd í Føroyum, men skal hesin framdráttur varðveitast, krevst miðvíst arbeiði við luttøku, menningarleiðum og sjónligheit. Dentur verður lagdur á at gera fótbólt til natúrliga valið hjá gentum og kvinnum, at hava sjónligar fyrimyndir í øllum leiklutum í fótbólti, miðvísar menningarleiðir fyri spælarar, venjarar og dómarar, og geva kvinnufótbólti tann pall, hann hevur uppiborið.



**Soleiðis sær framgongdin út í 2030:**

***Kvinnur í fótbólti eru sjónligar, fylgdar og fagnaðar***

***Luttøkan er økt við 25 % í øllum aldursbólkum***

***Kvinnur luttaka í øllum liðum av fótbóltsvirkseminum, bæði á vøllinum og uttan fyri vøllin***





# KVINNUR Í FÓTBÓLTI

## FOKUSØKI 1 Marknaðarføring og samskifti

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Menna marknaðarátøk, ið økja um áhugan fyri meistaradeildini fyri kvinnur. | Yvir 100 áskoðarar í miðal til toppdystir í ovara endaspæli í meistaradeildini og yvir 1000 áskoðarar til steypafinaluna. |
| Seta sjóneykuna á kvinnuligar fyrimyndir, bæði innan spælara-, venjara- og leiðsluleiklutir. | Sjónliggera kvinnuligar fyrimyndir í samskiftinum hjá FSF. Útbreiðsla og ávirkan verða máld árliga. |

## FOKUSØKI 2 Luttøka og varðveitsla

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Økja um talið á gentum og kvinnum, sum spæla fótbólt. | Økja núverandi tal á spælarum við 25 % í strategiskeiði. |
| Menna átøk og møguleikar fyri at fáa kvinnur at vera venjarar og dómarar. | Seks kvinnur ígjøgnum Dómaraleiðina annaðhvørt ár og 12 kvinnur ígjøgnum Venjaraleiðina annaðhvørt ár. |
| Skapa netverk millum kvinnur í fótbólti. | Árligt skeið við heitinum "Finn tína leið í fótbólti" og netverksátøk fyri kvinnur, ið virka ella hava hug at virka í fótbólti. |

## FOKUSØKI 3 Menning av kvinnufótbólti

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Menna eina skipan, ið eggjar feløgum at hava ein høvuðsvenjara fyri gentuliðini. | Fáa semju við feløg um eina krónu fyri krónu-stuðulskipan til HUV á gentu-síðuni, og at øll feløg brúka hesa skipan, tá ið strategiskeiðið er lokið. |
| Gransking um fótbólt sum frítíðarítriv uttan fyri skipaðu venjingarnar í feløgunum. | Samla vitan til at menna átak á vísinda-ligum grundstøði við endamáli at eggja gentum at spæla fótbólt í frítíðini. |





# STERKUR OG SAMEINDUR FELAGSSKAPUR

## *FSF, feløgini og áhugapartar skulu mennast saman.*

Feløgini eru lívsæðrin í føroyskum fótbólti – hvør einasti landsliðsspælari, fjeppari og sjálvboðin kemur úr einum felagi. Vit vilja leggja dent á gott samstarv ímillum FSF og feløgini, og vit vilja stimbra sjálvbodna arbeiðið.






**Soleiðis sær framgongdin út í 2030:**

***Feløgini hava amboð, vegleiðing og stuðul, sum tey hava tørv á fyri at mennast***

***Sjálvboðið arbeiði er burðardygt – ikki ein byrða, men eitt val***

***FSF og feløgini arbeiða saman og samskipað***

## STERKUR OG SAMEINDUR FELAGSSKAPUR

### FOKUSØKI 1 Førleikamenning

| Lutmál | Úrslit |
| --- | --- |
| Knýta ein samskipara at feløgunum, ið skal veita feløgunum tillagaða ráðgeving og stuðul. | Øll feløg hava atgongd til ein persón, ið skal menna feløgini. |
| Veita feløgunum greiðar mannagongdir, sum styrkir fyrisitingarliga arbeiðið hjá feløgunum. | Leiðsluhondbókin og Ofta Settir Spurningar (OSS) verða givin út og dagførd árliga. |

### FOKUSØKI 2 Fyrisiting

| Lutmál | Úrslit |
| --- | --- |
| Styrkja samstarv og samskifti millum FSF og feløgini | Skipað verður fyri árligum skeiði fyri nýggjar nevndarlimir, fótbóltsráðstevnu annaðhvørt ár og regluligum netverkstiltøkum |
| Menna Public Affairs-arbeiðið hjá FSF og tryggja bestu møguligu karmar fyri fótbóltin | Tryggja samstarv við minst fýra kommunur. |

### FOKUSØKI 3 Sjálvboðin

| Lutmál | Úrslit |
| --- | --- |
| Sjálvbodnað arbeiðið í fótbólti skal vera gevandi, skipað og burðardygt – alt lívið. | Greina umstøðurnar hjá sjálvbodnum í føroysku feløgunum og skipa fyri kunnandi verkstovum um at vera sjálvboðin. |





# VIT SIGA OKKARA SØGU

## *Sterk søgufrásøgn og miðvís marknaðarføring kveikir framtíðina hjá føroyskum fótbólti.*

Føroyskur fótbóltur er meira enn dystir og úrslit – hann umboðar eisini samleika, treiskni og samanhald. Minniligar sigursløtur á altjóða palli og gerandisløtur á heimligum vølli vísa, hvørji vit eru, og hvørjum vit standa fyri. Vit vilja brúka hesar søgur at siga eina sterka og savnandi søgu um okkum sum fólk og land. Ein frásøgn, sum kann skapa stoltleika heima og viðurkenning úti. Eitt brand, sum bindur fólk saman, kveikir trúgv og dregur at sær samstarvspartar, ið hava somu virði sum vit.





**Soleiðis sær framgongdin út í 2030:**

***Fótbóltur stendur sum eitt viðurkent tekin um føroyskan stoltleika, samleika og felags avrik***

***Fótbóltur er rótfestur í føroyska samfelagnum og savnar fólk tvørtur um ættarlið, øki og bakgrund***





## VIT SIGA OKKARA SØGU

### FOKUSØKI 1 Fjepparaáhugi og felagsskapur

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Fótbóltur skal nýtast sum ein jalig kraft til at fremja trivnað og styrkja sosialan samhuga í Føroyum. | Hvørt ár skipa fyri tveimum serligum fótbóltstiltøkum, sum styrkja felags-skapin í føroyskum fótbólti. |
| Menna samstørv við kommunur, stuðlar og felagsskapir fyri at røkka fleiri við fótbólti og styrkja áhugan og luttøkuna hjá fjepparum. | Tríggjar nýggjar samstarvsavtalur, sum skulu skapa áhuga millum fjepparar og hava við sær átøk, sum betra um áskoðarauppliivingina. |

### FOKUSØKI 2 Brand og marknaðarføring

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Brúka søguforteljingar sum høvuðsamboð at byggja ein felags samleika og vekja kenslur. | Styrkt samband hjá áskoðarum við søguna um føroyskan fótbólt, mátað við árligari kanning um luttøku, hugburð og afturmelding. |
| Menna eitt sterkt føroyskt fótbólts-brand, sum er greitt og støðugt á øllum virkisøkjum. | Gera greiðar leiðreglur, sum verða brúktar í FSF og feløgunum. Tilvitan og uppfatan verða máld árliga. |

### FOKUSØKI 3 Samskiftisstrategi og íverksetan

| Lutmál | Úrslit |
|---|---|
| Skapa samanhangandi samskifti fyri FSF við einari greiðari samskiftisætlan og strategiskum samstørvum. | Gera samskiftisstrategi við greiðum leiklutum hjá kanalunum, raðfesting av miðling og sam-størvum við føroyskar miðlar. |






# STUÐLANDI VERKÆTLANIR

**Saman við okkara fimm súlum hava vit eyðmerkt tvær verkætlanir, sum skulu stimbra framgongd í allari okkara strategi. Tær eru ikki knýttar at ávísari súlu, men fevna um alt arbeiðið hjá okkum og fara at ávirka allar partar av føroyskum fótbólti. Hesar verkætlanir komu fram í strategitilgongdini og vórðu støðugt nevndar í samrøðum og kjaki. Tær hava avgerandi týdning fyri framburðin.**



*Tilgjørd mynd / vitlíki*

VERKÆTLAN 1

## FÓTBÓLTSHALLIR

Veðrið ávirkar føroyskan fótbólt meira enn neyðugt. Fótbóltshallir í fullari støðd høvdu skundað undir virksemi og menning alt árið – og høvdu styrkt bæði breiddar- og úrvalsfótbólt.

Í strategitíðarskeiðnum byggja vit fleiri smærri fótbóltshallir, sum fara at skapa nýggjar møguleikar at menna føroyskan fótbólt á øllum stigum. Samstundis arbeiða vit víðari við ætlanini um at byggja fótbóltshøll í fullari støðd. Verkætlanin verður ment í hesum tíðarskeiði.

VERKÆTLAN 2

## BETRI KAPPINGAR, STERKARI FELØG

Fótbóltur hevur tørv á týðandi dystum. Við at endurskipa okkara kappingarleist skapa vit sterkari og javnari fótbólt – fleiri spennandi dystir, javnari úrslit og góðar umstøður hjá øllum feløgum at mennast. Betri kappingar styrkja menningina og gera føroyskan fótbólt á øllum stigum meira spennandi.

Í strategitíðarskeiðnum fara vit at endurskoða alla kappingarskipanina í føroyskum fótbólti, frá barnafótbólti til meistaradeildir, fyri at skapa bestu umhvørvi og møguleikar til okkara spælarar, venjarar og dómarar at mennast.


FØROYAR
19
23
reusch

Henda strategi er ein innbjóðing til øll í føroyskum fótbólti – feløg, venjarar, spælarar, dómarar, sjálvboðin, stuðlar og lokalsamfeløg – um at flyta okkum saman framá. Málini, vit hava sett okkum, eru framsøkin og stór, men tað ber til at røkka teimum, um vit arbeiða saman.

Vit skulu halda fast um okkara samleika og brúka okkara styrkir, stuðla hvørjum øðrum og støðugt hava fyri eyga, hvat ger føroyskan fótbólt sterkan og serstakan. Saman skulu vit skapa eina framtíð, sum vit øll verða errin av. Vit eru øll partur av ferðini fram í tíðina.

**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**